# Minningarorð um Marthu Johansen



Tyngri og tyngri verða sorgin og saknurin hjá mær, nú tú, góða Martha, er farin. Tú fylti so nógv í mínum lívi. Vit vóru saman hvønn dag. Tað var við gleði, at eg fór út til tín hvønn morgun. Tú gavst so nógv. Sjálvt um tað var tú, sum var sjúk, so sást tú so ljóst upp á alt.

Vit høvdu tað altíð so gott saman. Onkuntíð svav eg hjá tær, tá Egil var burtur í arbeiðsørindum. Altíð hevði tú so ringt við at lova Egili avstað. Tú orkaði ikki tankan um ikki at fáa fatur á honum, tá tú hevði brúk fyri honum. Tú var so bundin at honum, men allíkvæl vart tú altíð so glað Egilsa vegna, at hann slapp ein túr.

Ja, tað vóru mangan stuttligar nætur. Ikki svóvu vit nógv, men altíð, áðrenn vit løgdu okkum, komst tú fram við Bíbluni og sangbókini, og so lósu vit okkurt saman og kundu liggja og syngja langt út á náttina.

Martha, tú hevði eitt stórt hjarta, og tú elskaði øll børn. Tú hevði altíð so ringt av, at børn skuldu líða óræett. Sjálvt um tit eingi børn fingu, so høvdu tú og Egil Tinu, Inga og Jákup Eli sum tykkara egnu børn. Tú vart sum ein mamma fyri tey øll. Tit snakkaðu um tey, sum um tit áttu tey, og eg veit, at Tina Ingi og Jákup Eli og tit bæði hava havt nógva gleði hvør av øðrum.

So bleivst tú abbadiddi, og tú vart so stolt av Káru. Hon var nógv úti hjá tykkum, og eg veit, at Kára gleddi seg til at sleppa heim til abbadiddi at pynta til jóla. Góða Martha, tú vart so glað fyri jólini. Sjálvt um tú vart blivin sjúk aftur síðstu jól, so hevði tú alla familjuna úti hjá tykkum jólaaftan, og eg veit, at tú vart so glað fyri tað. Tú vart altíð so kedd um, at tú ikki orkaði at taka tær av Hannu, tá hon kom, men tú snakkaði um tey líka til tað síðsta. Tú var so glað um, at Tina, Kára og Hanna komu heim at vitja teg.

Eg minnist tann dagin, Allan fór við Sundabergi. Hann var úti hjá tær um dagin og segði farvæl, men ein tíma áðrenn hann skuldi avstað, ringdi tú aftur eftir honum. Tú fortaldi fyri mær dagin eftir, at tú hevði sitið og grátið í vindeyganum, tá Sundaberg fór út eftir vánni. Tú segði við meg: »Eg veit, at síggi ikki Allan aftur her,« og soleiðis varð tað eisini.

Góða Martha, mangan var tað ringt hjá mær, tí tú hevði tað ikki altíð so gott, men ongantíð vildi tú, at nakar skuldi vita av tí. Tá telefonin ringdi, var tú altíð skjót at siga: »Sig, at her stendur væl til.«

Tú vart so avklárað við alt. Tú gleddist um alt, sum stóð í Bíbliuni. Tú sást altíð eina meining við øllum. Tú segði so ofta: »Eg havi havt 40 góð ár.«

Nógv av tí, sum vit hava havt saman, kann eg ikki deila við nakran annan. Ja, eg minnist, tá tú komst við tí, at tú vildi velja tær sangir til jarðarferðina. Eg vildi ikki tosa um tað, men tá tú segði við meg: »Ert tú ikki glað fyri, at eg eri klár at fara herfrá?«, síðan tann dagin hava vit mangan sungið sangirnar saman.

Martha, tú hevði serligar gávur. Tú fortaldi mær nógv. Tú visti, hvønn veg tað bar, tað vildi tú altíð fortelja mær. Tú orkaði ikki meir, tú vildi sleppa úr hesi neyð. Tú visti, at tú komst í ein betri stað. Tú tosaði um himmalin og gleddi teg at sleppa hagar. Eg minnist, tá tú komst aftur úr Danmark fyri síðstu ferð. Tú tókst um meg og segði: »Gertrud, nú fari eg ikki aftur at ferðast, fyrr enn eg fari til tað landið, har ongin pína og sorg er.«

Eg kundi tikið nógv fram, men eg kann ikki lata vera at nevna deild M á sjúkrahúsinum fyri ta stóru hjálp, tit vóru. Altíð høvdu tit stundir at koma inn til Marthu, tá hon hevði brúk fyri tí. Tit vóru allar so góðar við Marthu og okkum. Takk fyri, at vit sluppu at føla okkum sum heima á deildini. Eg veit, at Martha var glað um, at Egil slapp at sova har og til tíðir at búgva har.

Góða Martha, takk fyri alt, tú hevur verið fyri okkum. Alla, Flóvin og Dagfinn hava mist eina góða gummu, sum teir sakna nógv og ongantíð fara gloyma.

Ingrid mostir, Jákup Eli, Gerd og Marner, má Jesus styrkja tykkum hesa tungu tíð, sum stendur fyri framman.

Góði Egil, saknurin hjá tær er størstur. Tú, sum hevur verið Marthu ein so góður stuðul, tú vart henni ein góður maður, sum Martha so ofta segði:

»Eingin hevur so gott tol sum Egil, eg hevði ikki klárað meg uttan hann.«

Góði Egil. Tú hevur verið ígjøgnum nógv. Tað hava verið nógvar tungar løtu hjá tær, men altíð vart tú við tí góða, vísti við tí góða toli, tú hevur, at tú elskaði hana og gjørdi alt, sum stóð í tínari makt, fyri at hjálpa henni.

Má Jesus styrkja teg, Egil, og okkum øll í hesi sorg.

**Gertrud**

**VIÐMERKINGAR**

# Ikki sleppur dugandi maður at verða uppkallaður

**Hjalmar P. Petersen**



Einaferð bar til at eita tað, mann vildi - bara prestur kundi nokta. So kom ein lóg. Knappliga vóru bara nøkur fá nøvn loyvd. Bara tankin er groteskur. Teir fáu sluppu at kroysta sínar normar yvir tey mongu. Tann gamla *Vilhelmine Christine Himmeline Justesen,* kallað upp eftir sjálvum Kristi og himmalfarsdegi hansara, varð strikað, tí hon hevði fleiri enn tvey nøvn, og um onkur eftirkomari hennara sleppur at bera *Himmelinenavnið*, er allarhelst óvist.

Men skamt skulu harðir harrra ráða.

Tann miseydnaða navnalógin frá 1992 bleiv endurskoðað, og nú eru rúmari ræsir, men ikki nóg gott kortini, tí vit skulu als onga navnalóg hava, meini eg. Vit skulu sleppa at brúka øll tey nøvnini, sum verið hava í 19. og 20. øld. So einfalt, og tá verður maður/kona ikki kallað(ur) burtur úr ætt.

Jógvan av Lakjuni hevur víst á skilaloysið í navnalógini. Jú dømini eru har. Eitt nú ber til at eita og skriva seg Jonn og John, men ikki Michael. Her skal tað vera Mikal. Hví hava John, men ikki Michael? Er tað demokratiskt, ella eru undantaksloyvi givin teimum fáu? Hvussu við Jenný. Hetta gongur ikki eftir føroyskum framburðarreglum, men eftir íslendskum, har *-ý* hevur ein *-i* framburð, meðan vit vissuliga siga *-ui* í føroyskum. Tí skuldi tað, skal tað skrivast eftir føroyskum reglum, verið *Jenny.*

**Nøvn og máldeyði**

Nøvn valda ikki nakran máldeyða. Einki mál í hesum heimi er deytt, tí tað hevur havt fremmand nøvn, og grundin er hon, at nøvn eru *indeks.*

Hetta gongur aftur til amerikanaran C.S.Peirce. Hann tosar m.a. um tekn, eisini málslig tekn, og fyri at lætta eitt sindur um, kunnu vit siga, at eitt málsligt tekn er tað sama sum eitt orð, sjálvt um tað ikki heilt er tað sama.

Man lat tað fara.

Hetta greinarpettið skal ikki nýtast til annað enn at vísa á, at nøvn standa á jøvnum føti við eitt nú hjáorð og fornøvn í teirri málsligu skipanini.

Peirce hevur eitt trýbýti av tekninum. Hesi kallar hann *ikon, indeks* og *symbol.*

Sært tú eina mynd av Nólsoynni, er eitt beinleiðis, fysiskt samband ímillum Nólsoynna og myndina, og hetta er eitt ikon. Viss orð hava hetta sama í sær. Tað eru ljóðeftirhermandi orð. Tú hevur eitt beinleiðis, fysiskt samband ímillum *krá, krá* og *krákuna*, t.e., ímillum ljóðketuna og dýrið.

Onnur tekn eru *indeksini*, sigur Peirce.

Sært tú royk, gevur hann tær eina psykologiska assosiatión til eld. Sært tú fótafet í kavanum, fær tú eina psykologiska assosiatión til eitt menniskjað.

Viss orð í málinum eru indeks. Talan er um fornøvn sosum *eg, tú, hann* og hjáorð eins og *her, har, nú...*

Um systir tín sigur *eg fari at keypa,* fært tú, sum hoyrir setningin, eina beinleiðis, psykologiska assosiatión ímillum fornavnið *eg* og tann persónin, tað peikar á. Sigur beiggi tín, omman ella farbróðurin ella onkur heilt annar, t.d. løgmaður, at *eg fari at keypa,* vísir fornavnið í hvørjum einstøkum føri til hesar persónarnar. Lurtarin fær tá eina aðra psykologiska assosiatión ímillum orð og persón. Hetta eru indeksini, og tað átti at verið rímiliga greitt, at nøvn, og eisini staðarnøvn, hoyra undir henda bólk. Lurtarin fær eina psykologiska mynd, so at siga, av persóninum, tá hann hoyrir navnið. Tað er einki í bókstavasamansetingini, sum skapar hesa psykologisku assosiatión, sum tað er í ikonunum, har tað fysiskt er eitt samband ímillum ljóðini *krá, krá* - tey vit hoyra - og krákuna.

Nøvn eru ikon, og sum ikon ganga tey inn í málskipanina á ein annan hátt enn vanlig orð, t.e. symbol, sum vit stutt skulu nerta við niðanfyri.

Í øllum teimum indoeuropeisku málunum, og allarhelst í fleiri øðrum av heimsins málum, er tað soleiðis, at fornavnaskipanin gongur eftir alt øðrum bendingum enn vanlig navnorð. Tað sæst við at benda eitt nú *eg, meg, mær, mín* mótsett *armur, arm, armi.* Ólíkskapurin fær ikki verið størri.

Av tí at nøvnini ganga eftir einari aðrari skipan, er tað heldur ikki óvanligt, at tey ikki bendast! Vanligt er í føroyskum at siga, at *eg fari at vitja Ólavur* - meðan tað næstan er undantakið, at fólk siga *eg fari at vitja Ólav,* og hetta stendst júst av, at nøvnini eru ikon, ikki symbol. Málsøguliga sæst tað eisini, at tey eru annarleiðis enn vanlig orð í málinum. Tí er tað, at mann í staðarnøvnum hevur undarligar formar eins og *Strapuli* í Sandavági ella *Roggutuóm*, eitt seyðafylgi, sum kemur av *Reiðgøtuóm*. Um hetta seyðafylgi hevur E. Weyhe skrivað eina grein. Nøvn verða eisini samanrykt og vit finna *Jón* frá *Jóhannes* o.s.fr., júst tí tey uppføra seg annarleiðis enn vanlig orð.

Stutt skal eg nevna, at C.S.Peirce sigur um vanlig orð, at tey eru symbol. Tekur tú orðið *hundur*, so er einki samband ímillum ljóðketuna og merkingina. Tað er einki í u t.d., sum sigur, at hetta orðið skal nýtast fyri ein hund, og sum symbol, stendur tað fyri allar hundar, vit hava í heiminum í dag, teir sum vóru, og teir sum koma skulu.

Samanfatandi kann sigast, at natúran í nøvnum er soleiðis, at tey e r u annarleiðis enn vanlig orð, og tað sigur so mikið sum, at tey ikki volda nakran máldeyða. Tí er ein navnalóg, um ætlan hennara er at verja føroyskt, burtur úr vón og viti, og meini eg eisini, at frægast er at avtaka navnalógina. Eg meini, at føroyingurin skal sleppa brúka øll tey nøvn, sum verið hava í 20. og 21. øld, og ikki fyrr enn tá vísir mann virðing fyri uppkallingarsiðinum og okkara heildarmentan. Ikki ber til at liva eftir normunum hjá teimum fáu í hesum føri.



# Gjaldskipanin er óneyðug

**Leiðslan niðurger tær skipanir, sum eru mentar á Elektron, og hon sigur hálvar sannleikar í herferðini fyri Gjaldskipanini. Tað siga starvsfólkini á Elektron. Stóð tað til teirra, so var V&T-skipanin ment í staðin, tí tað hevði verið bíligari og fult so gott**




*Samsvar er ikki millum tað, sum starvsfólkini á Elektron halda, og tað, sum leiðslan alment ber fram í málinum um nýggju Gjaldskipanina*

ELEKTRON-MÁLIÐ
*Ingi Rasmussen*

Gjaldsskipanin er óneyðug, og tað hevði loyst seg betur at útbygt føroysku V&T-skipanina.

Tað siga starvsfólkini hjá Elektron. Tey hava sent leiðsluni eitt hvassorðað bræv, har tey harðliga átala hennara framferð í málinum um persónsupplýsingar og Gjaldskipanina, sum hevur verið so nógv frammi.

Mótmælið er skrivað í kjalarvørrinum á óvanligu heilsíðulýsingunum, sum Elektron og peningastovnarnir settu í stóru dagbløðini 23. november. Tað er starvsfólkafelagið, sum talar at tí, sum tey kalla »reklamuherferðini hjá Elektron og peningastovnunum«.

Starvsfólkini siga í svarinum, sum er sent 26. november, at leiðslan bæði niðurger tær skipanir, sum eru mentar á Elektron, og kemur við hálvum sannleikum til frama fyri Gjaldskipanina.

## Kanning gjørd

Higartil hevur stríðið um Gjaldsskipanina verið rættiliga prinsipielt og hevur snúð seg um rættartrygd. Men nú brævið frá starvsfólkunum er komið fram, er verri at fáa eyga á, hvørji atlit liggja til grund fyri at fara yvir til Gjaldskipanina. Sum skilst er ein kostnaðnyttu kanning gjørd á Elektron, har vigast skuldi fyri og ímóti at útbyggja V&T-skipanina ella fara yvir til eitt tætt samstarv við PBS um eina gjaldskipan. Niðurstøðan var, at tað loysti seg betur at útbyggja V&T-skipanina.

Kortini valdu peningastovnarnir og Elektron loysnina at samstarva við PBS. Tí uttan hendan samstarvsmøguleika »hevði Elektron verið noytt til at brúkt sera nógva orku fyri at kunna bjóða eina líknandi tænastu«, var sagt í áðurnevndu lýsingunum í bløðunum.

Hetta er als ikki rætt, siga starvsfólkini.

## V&T bíligast

Drúgvu undankanningarnar vístu, at ein útbygging av V&T-skipanini hevði verið tann bíligasta og besta loysnin, sigur starvsfólkafelagið, og tað vildi ikki verið brúkt meira orka til hetta arbeiði, enn tað er brúkt upp á Gjaldskipanina higartil. Og starvsfólkini skoyta uppí, at 99% av Gjaldskipanini er ment á Elektron, so tey skuldu nokk klárað tað uttan PBS.

Starvsfólkini mótmæla í somu vending, at tað skal vera neyðugt at flyta persónsupplýsingar um landamørk fyri at luttaka í altjóða samstarvi við aðrar fyritøkur, sum Elektron og peningastovnarnir føra fram. Tey siga, at tað ber væl til at gera skipanir í samstarvi við virki uttanlands, uttan at persónsupplýsingar eru við. Fesk dømi um hetta eru Netbankin og Tollskipanin.

## Yvirlit uttan trupulleika

Tað, sum serliga hevur fingið ilt í starvsfólkini á Elektron, er tann umrøða, sum leiðslan og peningastovnarnir geva V&T-skipanini. Ført hevur verið fram, at hon ikki so frægt sum kann vísa eitt yvirlit yvir fíggjarstøðuna. Tað undrast starvsfólkini á, tí tað kann Gjaldsskipanin heldur ikki.

Helst verður meint við gjaldsyvirlitið, siga starvsfólkini, men tað hevði ikki kravt ta stóru orkuna at gjørt eitt líknandi yvirlit í V&T-skipanina.

Sostatt er eitt sindur ilt hjá uttanfyristandandi at skilja, hví tað er so umráðandi hjá leiðsluni fyri Elektron og peningastovnarnar at avhøvda V&T-skipanina.

Fólk í peningaheiminum, sum Sosialurin hevur tosað við, siga í øllum førum, at hon hevur virkað uttan trupulleikar í 10 ár, og tað hevði verið lætt at útbygt skipanina.

**Fakta**

Gjaldskipanin skal avloysa V&T-skipanina, sum var ment á Elektron í 1992. Talan er um eina skipan, sum ger sjálvvirkandi flytingar fyri fólk. Gjaldskipanin, sum er ein føroysk útgáva av Betalings Service hjá PBS, krevur, at upplýsingar verða sendar til Danmarkar, hóast ein løgtingslóg er ætlað at forða fyri hesum. Elektron fekk kortini í øðrum umfari loyvi til hetta frá Dataeftirlitinum, men landsstýrismaðurin við lógarmálum hevur sett sær fyri at herða kunngerðina um vernd av persónsupplýsingum, so málið verður steðgað. Tað hóvar leiðsluni á Elektron og peningastovnunum sera lítið.

# Postverkið kann missa pengar

**Pengeinstitutternes Betalings Systemer í Danmark tjena pengar fyri hvørja sjálvvirkandi flyting, sum føroyingar fremja frameftir. Harafturímóti kann Postverk Føroya missa nakað av peningi, um farið verður yvir til GjaldSkipan í staðin fyri V&T-skipanina. Postverksstjórin óttast kortini ikki gongdina**

GJALDSSKIPAN
*Ingi Rasmussen*

Verður føroyska V&T-skipanin avhøvdað til frama fyri nýggju Gjaldsskipanina hjá Elektron og peningastovnunum, so kann Postverkið missa munandi upphæddir.

Tað metir ein kelda við góðum kunnleika til peningaheimin, sum kennir væl til V&T-skipanina.

Stórir kreditorar, so sum SEV, Shell, Statoil, Føroya Tele og Kall díkja okkum undir í fráboðanum. Hóast rokningarnar verða goldnar við føstum flytingum, so syrgja stóru fyritøkurnar altíð fyri at senda eina fráboðan frammanundan, har sagt verður frá, hvussu nógv verður flutt av tínari konto. Vit kenna tað oftast sum eitt krossað girokort.

Nýggja Gjaldskipanin sendir eitt samlað yvirlit til kundan, og tí kann roknast við, at kreditorarnir gevast at senda fráboðanir sjálvir.

## Niður at venda

GjaldSkipanin er ein føroysk útgáva av Betalings Service hja PBS. Við nýggju skipanini skulu allar flytingar til Danmarkar at venda. Fyri hvørja einstaka flyting fær PBS yvir 4 krónur. Talan er sostatt um milliónaupphæddir, ið enda í Danmark.

Nú farið verður yvir til Gjaldskipanina fær kundin sostatt eitt samlað yvirlit hvønn mánað. Tað merkir, at stóru føroysku kreditorarnir ikki longur nýtast at senda sínum kundum eina fráboðan, tí hon stendur á mánaðarliga yvirlitinum.

Sostatt kann Postverkið missa inntøkurnar fyri porto av øllum teimum fráboðanum, sum vit fáa frá telefyritøkum, oljufeløgum og øðrum.

## Stórur partur

Postverkstjórin sigur, at handilspostur er ein stórur partur av inntøkukelduni hjá Postverkinum, og harímillum eru eisini fráboðanirnar um fastar flytingar frá kreditorum.

Bergur í Garði óttast kortini ikki fyri, at Postverkið gerst fátækt av hesi orsøk.

– Tað slept ikki undan, at øll automatisering vil viðføra, at posturin minkar. Men sum postverkstjóri eri eg ikki bangin fyri, at stóru kreditorarnir gevast at senda brøv til sínar kundar, hóast teir ikki nýtast tað longur, sigur Bergur í Garði.

Í Gjaldskipanini stendur navnið á kreditorinum millum nógvar aðrar, sum eru savnaðir í einum yvirliti. Sostatt er hann ikki serliga sjónligur.

– Um stóru kreditorarnir eru góðir við sínar kundar, so trúgvi eg ikki, at teir eru nøgdir við at standa á einari linju á einum brævi frá Gjaldstænastuni. Teir fara helst framhaldandi at senda sínum kundum brøv, so teir eisini frameftir eru sjónligir í hugmyndini hjá kundanum, sigur Bergur í Garði.

# Ein søga um tuberklar



*Oluf Djurhuus við nýggju bók síni »Gutthús«*
*Mynd: Jens K. Vang*

»Gutthús« eitur skaldsøga eftir Oluf Djurhuus, sum er komin út.

Søgan fer fram í tíðarskeiðnum síðst í 19. øld og nakað langt fram í 20. øld. Evnið er tuberklarnir, sum rættiliga gera um seg hesa tíðina. At skaldsøgan fekk heitið Gutthús, komst av tí, at hetta húsið í veruleikanum varð so ómetaliga hart rakt, greiðir Oluf Djurhuus frá.

Hann hevur sjálvur ættarbond úr hesum húsi í móðurætt, men hann sigur kortini talan vera um eina skaldsøgu, ið viðger hendingar í hesum tíðarskeiði, sum serliga eldri komast við. Uttan iva eru eisini mong av teimum ungu áhugað í at vita, hvussu undanfarin ættarlið baldust.

Oluf minnist hesa tíðina sum trupla. Men ikki minni gleðilig kendist tann tíðin, tá læknarnir fingu tamarhald á sjúkuni við heilivági og skurðviðgerð.

Oluf Djurhuus hevur áður skrivað fleiri bøkur, m.a. tvær skaldsøgur í 1999 og 2000 nevndar »Vónbrot« og »Tey, ið undan fóru«. Hann hevur eisini skrivað fleiri minningarrit, eitt nú um Skála handverkarafelag, Skála arbeiðsmannafelag.

**-ir**